

Jóhanna Guðrun gjørdist kend kring Europa, tá ið hon gjørdist nummar tvey í Eurovision sangkappingini í 2009

# Føroysku børnini togaðu í meg

**ÍSLENDSKA** SONGKVINNAN **JÓHANNA GUÐRUN** VAR BARNASTJØRNA Í **FØROYUM** OG UPPLIVDI **MUNIN** MILLUM **ÍSLENDSK** OG FØROYSK **BØRN** Á KONSERTUM Í **FØROYUM**



**TÓNLEIKUR**
Eyðun Klakstein
eydun@sosialurin.fo

Í 2003 sungu ein føroysk og ein íslendsk barnastjøna eina duett. Still Friends kallaðist sangurin, sum Brandur Enni og Jóhanna Guðrun spældu inn. Tey høvdu eisini framførslur í Føroyum og í Íslandi.

Johann Guðrun upplivdi í sambandi við framførlsurnar, at í Føroyum var munandi meira lív í til hennara framførslur.

– Tað var stórur munur á at syngja í Føroyum og Íslandi. Í Íslandi eru fólk reserverað, og tey klappa spakuliga. Í Føroyum vóru børnini nógv lívligari, og øll vildu toga í meg. Tað var stuttligt, sigur Jóhanna Guðrun.

### Syngur kring Europa

Jóhanna Guðrun er nú 20 ára gomul og framvegis nógv frammi sum songkvinna. Í 2009 var hon nummar 2 í altjóða Eurovision kappingini, og tað hevði við sær, at hon varð nógv umbiðin til framførslur kring Europa. Jóhanna Guðrun var eisini við í Eurovision í Íslandi í ár, men hon vann ikki kappingina hesaferð.

Jóhanna Guðrun arbeiðir nú við nýggjari útgávu, og umframt at virka sum sangari, undirvísur hon eisini fólki í sangi.

– Eg havi bæði vaksin fólk og børn, sum fáa undirvísing í sangi frá mær. Eg havi sjálv sungið, síðani eg var smágenta, og eg havi eisini tikið skeið í sangi, so eg fái lært frá mær, sigur hon.

## INNIHALD


2 KLUMMA: **30 ÁR ERU NÓG MIKIÐ**
4 INTERVIEW: **PETUR PÓLSON**
8 TIPS: **HVÍTT TIL SUMMARIÐ**
10 MYNDAFRÁSØGN: **HJÁ DJÓRALÆKNANUM**
12 TIL ARBEIÐIS: **JÓNA PETRA EBBADÓTTIR**
14 Í RANGASTRÚPAN: **YMISKT ÚR MIÐLUNUM**
14 UMAFTURAFTURUM: **HØGNI DJURHUUS**
15 90 SEKUND: **INGOLF OLSEN**
18 INTERVIEW: **JÁKUP VEYHE**
20 GREINARØÐ: **LIST Í ALMENNA RÚMINUM**
26 KAPPINGAR: **VINN GÓÐAR VINNINGAR**
28 MIÐLAMJARR: **TAÐ SIGA TEY Á FACEBOOK OG Í MIÐLUNUM**
31 TAÐ HENDIR: **KONSERTIR, TILTØK, BØKUR OG ANNAÐ**
32 VIKUMYNDIN: **JAPAN**


VIKUSKIFTI
**Redaktørur:** Eyðun Klakstein
**Útgevari:** Sosialurin, www.sosialurin.fo
**Umbróting:** Sosialurin · **Høvuðssniðgevi:** Pætur Eyðunsson Jensen
**Forsíðumynd:** Petur Pólson / Eyðun Klakstein

**KLUMMAN**



Birgir Waag Høgnesen

# 30 ár eru nóg mikið

Tað byrjaði í Tunis, har presidenturin Zine el Abidine Ben Ali bara hevði sitið í 23 ár.

Í Egyptalandi mótmælatu fólk, tí tey eru troytt av Mubarak eftir 30 ár í sessinum; har eru 30 ár nóg mikið, og tí skuldi hann frá.

Í Jemen hevur Ali Abdullah Saleh sitið í meir enn 30 ár, og fólkið er fara út á gøturnar at gera uppreistur, so hann eisini verður frákoyrdur.

Her heima fór Óli Jacobsen frá eftir 30 ár í Fiskimannafelagnum, um ikki sjálvur, so kann man siga, at hann bleiv »vippaður« út við manér.

Herfyri fór Anfinn Kallsberg frá eftir 30 ár. Um tað var ein innanhysis uppreistur ella eftir egnum ynski, tað vita vit ikki, men nú kann so ongin mótmælisgonga fáa hann burtur.

Ingeborg Vinther ynskir ikki nakra mótmælisgongu, tí hon er farin frá eftir egnum ynski eftir 30 ár sum formaður í Føroya Arbeiðarafelag.

Um Óli Breckmann er bangin fyri mótmælisgongum er ikki gott at vita, men herfyri segði hann við Sosialin, at hann umhugsar at fara úr tingsessinum eftir 30 ár. Møguliga sær Óli fyri sær, at fólk fara at fylla Vaglið, har tey krevja hann frá.

Tað sær út til, at 30 ár er tað magiska talið, har fólk vilja hava politikarar og fagfelagsfólk frá valdinum.

Hvat við Jóannes, Hergeir, Heina O. Heinesen og Edmund – leggja teir frá sær, áðrenn teir hava sitið 30 ár í politiki? Jóannes hevur gjørt støðuna upp, men Heini treiskast...

Enn skoytar Heðin Mortensen víðari, hóast hann hevur verið meir enn 39 ár í politikki.

Skuldi tað hent, at fólk fáa hug at mótmæla, fyri at fáa Heðin frá, so kemur tað væl við, tí einki er so gott fyri Heðin, sum at tað kemur fokus á hann.

